MENTAMÁLARÁÐIÐ

Kringvarpsstýrið
Stílað: Rúni Heinesen, form.
T-post: runih@tsk.fo

Dagfesting: **3. februar 2014**
Tygara ref.:
Máltal.: **13/00799-11**

**Viðvíkjandi nýggjársendingini 2013**

Mentamálaráðið hevur skrivað frágreiðing í samband við, at Kringvarp Føroya valdi at útveita nýggjárssendingina 2013. Frágreiðingin er viðløgd.

Í sambandi við frágreiðingina setti Mentamálaráðið tann 8. januar 2014 Kringvarpinum spurningar um mannagongdir v.m. í sambandi við útveiting. Kringvarpsstýrið svaraði tann 22. januar 2014.

Í niðurstøðuni í frágreiðingini framgongur m.a., at Kringvarp Føroya átti at gjørt yvirskipaðar og fastar mannagongdir og leiðreglur fyri stovnin og serliga í førum, tá ið onnur framleiða sendingar fyri stovnin. Hetta kundi byrgt upp fyri ivamálum í sambandi við greiða skilnaðin millum sponsorering og programminnihaldi. Í mannagongdunum skal atlit takast til ásetingar í rundskrivi frá 1. oktober 2013 hjá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum.

Mentamálaráðið fer við hesum at heita á Kringvarp Føroya um at fáa slíkar mannagongdir og leiðreglur fyri stovnin og kunna Mentamálaráðið um loysnina á málinum.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Bjørn Kalsø
*landsstýrismaður*

Poul Geert Hansen
*aðalstjóri*

**+Fylgiskjal**

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo